


www.oljan.fo

**Jan Müller** 14 - 01 - 2013

# Føroysk frálandavinna kappingarfør

Tað var ein fegin Jens Meinhard Rasmussen, sum í morgun kundi boða frá, at Skansi Offshore hevði gjørt sáttmála við Statoil um, at Eldborg skal í arbeiði fyri felagið í Eysturafrika. Og eisini hjá Statoil eru tey fegin um at kunna hava gjørt sáttmála við føroyska frálandareiðaríið. Rúni M. Hansen, stjóri hjá Statoil sigur við oljan.fo, at tað er hugaligt at síggja, at føroysk frálandareiðarí eru kappingarfør bæði í prísi og dygd. Við hesum sipar hann til nýggju avtaluna millum Skansi Offshore og Statoil, har Eldborg skal arbeiða á nýggju gassleiðunum hjá Statoil út fyri Tanzania og Mozambique. Rúni Hansen sigur, at Statoil longu hevur havt góðar royndir av Skansi Offshore, sum eigur fýra frálandaskip. Sjóborg hevur gjørt fleiri uppgávur fyri felagið. Statoilstjórin, sum var á vitjan í Tanzania í síðstu viku, sigur, at tað var hugaligt at síggja, at eisini innan seismikkvirksemi hjá Statoil í Eysturafrika, er eitt føroyskt skip í vinnu, nevniliga Thor Server hjá reiðarinum Thor í Hósvík. Mynd Thor Server, sum arbeiðir fyri Statoil í Eysturafrika fær nú selskap av Eldborg hjá Skansi Offshore. Her Thor Server við bryggju í Havn. Í gula bygninginum húsast Statoil. Føroysk frálandaskip kappingarfør, her Tórsborg við bryggju í Havn við Tinganesi í baksýni Rúni M. Hansen, stjóri hjá Statoil prátar við stjóran í Skansi Offshore, Jens Meinhard Rasmussen. Myndatøka - oljan.fo/Jan Müller